FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 21. september 2021
J. nr.: 21/17736
Viðgjørt: AE

Svar til fyrispurning nr. 52-033/2021 frá Páll á Reynatúgvu, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen, um asfaltering av vegnum millum Skopun og Sand.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, nær vegurin millum Skopun og Sand verður asfalteraður aftur?
2. Kann landsstýrismaðurin greiða frá, um koyritrygdin á vegastrekkinum verður mett at vera í lagi?
3. Hevur landsstýrismaðurin gjørt eina raðfesta ætlan fyri viðlíkahaldið av landsvegakervinum í Føroyum?

Svar:
Vegurin millum Skopun og Sand er tvíbreytaður, og hóskar væl til ferðsluna á staðnum. Eitt vegastrekkið sum er 500 metrar langt millum Skopun og Sand, treingir til at vera asfalterað. Arbeiðið verður raðfest frammaliga, og verður eitt slitlag eftir ætlan lagt á næsta ár (2022).

Landsverk metir at trygdin á vegnum millum Skopun og Sand er í lagi, um bilførarar koyra eftir umstøðunum. Landsverk fylgir gongdini.

Landsverk raðfestir á hvørjum ári hvussu játtanin skal brúkast til at viðlíkahalda og dagføra landsverðslukervið, herímillum eisini tunlar og brýr.

Samstundis sum vegakervið er útbygt, ferðslan er vaksin, størri dygdarkrøv og trygdarkrøv verða sett til vegir, er játtanin til viðlíkald av vegakervinum ikki hækkað í nógv ár. Tó soleiðis at tað hevur eydnast at hækka játtanina munandi í ár (2021) til at viðlíkahald, umvæla og betra trygdina á landsvegakervinum.

Landsstýrismaðurin ásannar, at neyðugt verður at raðfesta viðlíkahald fremri næstu árini.

Tinganes, 21. september 2021

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum